# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Reyð-grønur sigur í Noregi

Reyð-grøna stjórnin hjá Jens Stoltenberg heldur fram í Noregi. Stjórnarflokkarnir fingu 86 tinglimir, móti 83 tinglimum hjá andstøðuni. Vinnararnir vóru teir stóru flokkarnir Arbeiðaraflokkurin, Høgra og Framburðsflokkurin.

Framgongdin hjá Arbeiðaraflokkinum er merkisverd, tí flokkurin í valstríðnum hevur lagt stóran dent á gomlu sosialdemokratisku virðini, samstundis sum flokkurin hevur staðið sum ein nútímans flokkur við einum sera dugnaligum og karismatiskum leiðara. Valsigurin er tí eisini ein stórur persónligur sigur fyri formannin, Jens Stoltenberg, sum hevur rikið eitt sera gott valstríð, har hann støðugt hevur víst til sosialdemokratisku hugsjónina. Flokkurin hevur lagt stóran dent á vælferðarsamfelagið og menningina av hesum samfelagsmyndli. Her var eingin útsøla og her hevur ikki verið uppá tal at privatisera stóru almennu fyritøkurnar ella at sleppa marknaðarkreftunum leysum, soleiðis sum ávísir sosialdemokratiskir flokkar í Europa hava gjørt fyri eftirfylgjandi at verða revsaðir fyri av veljarunum.

Tað gekk ikki eins væl hjá tí eina stjórnarflokkinum, Sosialistiska vinstraflokkinum. Hesin flokkur rak valstríð við denti á umhvørvismál, serstakliga við spurninginum um oljuleitingina í Lofoten og Vesterålen, sum flokkurin vil steðga av fyriliti fyri umhvørvinum. Flokkurin er tí viknaður, men heldur kortini fram í reyð-grønu samgonguni. Miðflokkurin helt støðuna og varð hetta av eygleiðarum mett sum eitt bragd, og flokkurin er styrknaður í sjálvari samgonguni.

Sum heild viknaði miðjan í norskum politikki, meðan útleingjurnar styrknaðu. Flokkurin Vinstri, sum er bróðurflokkur við Radikala Vinstra í Danmark, misti sína umboðan á Stórtingi. Hesin flokkur hevur lagt dent á humanu virðini, eitt nú á ein sømiligan útlendingapolitikk, og nógv meta tí tap floksins sum eitt afturstig fyri eina humana dimensjón í norskum politikki. Hinvegin eru tað eygleiðarar, sum halda, at hesi virði stóðu sterk í valstríðnum hjá samgonguflokkunum, sum so gjørdust alternativ til Vinstra, ið datt niður ímillum.

Tað má ásannast, at høgravongurin hevði eitt gott val, hóast einki stjórnarskifti verður. Høgraflokkurin og Framburðsflokkurin hava rikið eitt hart valstríð, har teir hava gjarað út við oljupengum og skattalætta. Framburðsflokkurin hevur avdúkað seg sum ein reint høgrapopulistiskur flokkur. Flokkurin fór sera harðliga fram móti innflytarum og flóttafólki, og flokkurin tykist enn meira mannafíggindaligur og inhumanur enn bróðurflokkurin í Danmark. Hesin politikkur stendur í stórum mótsetningi til ta humanu kós, sum samgonguflokkarnir hava hildið í útlendingamálinum. Valúrslitið er sostatt eitt dømi um eina ørkymlandi og ógvusliga polarisering í grannatjóðini fyri eystan, men politisku markamótini í Noregi eru nú greiðari enn áður við tað, at norskur politikkur nú snýr seg um høgra ella vinstra. Tað tykist ikki vera nogv rúm fyri millumstøðum ella fyri stórum politiskum loysnum tvørtum um miðjuna av tí einføldu orsøk, at miðjan í norskum politikki er burtur. Hvørt hetta er norsku tjóðini til gagns, fer tíðin at vísa.

**Sosialurin**

## Nú ketan leyp av



**BJARNI DJURHOLM**
løgtingsmaður

**Greiða alternativið til 10 tals mio kr árliga í stuðli til Atlantsflog er at optimera kappingina við nýggjum flogvølli**

Undan vikuskiftinum vóru boðini: Gerið flúgvingina burtur í heim samhaldsfasta. Uppskriftin er at spenna landskassan fyri Atlantsflogi.

Boðskapurin er burturvið. Skal skattgjaldara peningur nú eisini nýtast at rinda fyri ferðing? Tað verður ein skrúva uttan enda. Og hvar gongur so markið í umfordeilingini? Kunnu vit so ikki bara avlevera allar lønarinntøkurnar til politisku kannustoypararnar, sum so kunnu fordeila til høgru og vinstru, soleiðis sum lagið er?

Skuldi hugskotið fingið politiskt kjølfesti, hvussu er ætlanin at fremja tað í verki? Tað er ómøguligt at handfara slíkar ætlanir í børsskrásettum felagi. Tað er eisini beinleiðis skaðiligt fyri virðið á felagnum, at politiskir framsøgumenn viðgera slíkt í miðlunum. Eingin kann taka okkum fyri fult. Tosaði nakar um Føroyar sum íleggjaraland?

**Kaospolitikkur**

Alternativið er, at Atlantsflog gerst landsfyritøka. Og tá leypur ketan púrasta av. Tí tá má landið keypa aftur 33% av partabrøvunum, uttan nakar kennir kursin í slíkum øvilsi. Samstundis átekur landið sær øll forpliktilsi, m.a. at standa sum garantur tá flotin skal endurnýggjast við flogførum í 300 mio. klassanum.

Tá landið seldi triðingin av Atlantsflogi vóru boðini greið til íleggjararnar. Næsti triðingurin skuldi seljast árið eftir. Búskaparkreppan hevur forðað hesum. Men harfrá at røgva aftur um byrjanarstøðið. Tað er kaospolitikkur.

Ístaðin átti skrá at verið gjørd fyri næsta søluumfarið, so felgið kundi verið marknaðargjørt og uttan íblandan kundi samstarva við onnur flogfeløg um leiðir, materiell, teknikk o.s.fr.. Tað hevði gagnað rakstrinum og harvið brúkarunum.

**Eingin kapping**

Politiskt ber eisini til at minka um flogkostnaðin. Fyrst er at strika ferðaavgjaldið. Hóast tað ikki ger allan munin, so er signalvirðið greitt í avgerðini. Men størsta forðingin fyri lægri prísum er manglandi kappingin.

Orsøkin er flogvøllurin.

Í 2005 setti eg kanning í gongd at lýsa hvar nýggjur altjóðaflogvøllur kann liggja. Hetta er tíðarkrevjandi arbeiði, men verður arbeiðið liðugt um árskiftið komandi.

Hóast tað hava verið fleiri luftkastellir frá ymsum síðum, meðan kanningarnar eru gjørdar, so fer úrslitið í vetur óivað at geva greiða ábending um, hvar nýggjur flogvøllur skal liggja.

Tað hevði verið skilabetri at tikið hond um tann spurningin, heldur enn at viðgera almenna slangu i flogfelagið. Kanningarúrslitið fer helst at vísa, at tað verður minni munurin í tíð at byggja nýggjan flogvøll enn at leingja í Vágum.

Greiða alternativið til 10 tals mio kr árliga í rakstrarstuðli til Atlantsflog, er tí at optimera kappingina við nýggjum flogvølli.

## Fundamentalist



**RICHARD DANIELSEN**

Summi síggja hetta orðið sum eitt ljótt orð. Men skilligt er, at tað er innan fyri andalig viðurskifti, tey halda tað. Tá ið tað kemur til tað, sum vit síggja og kunnu taka í, eru nokk øll samd um, at fundament í øllum dagligum viðurskiftum er neyðugt. Vit kunnu taka til dømis:

Tá ið tú skalt byggja eini hús, so mást tú seta tey á eitt gott fundament, sum heldur, so tú altíð kanst føla teg tryggan í húsum tínum.

Ein og hvør felagskapur má hava eitt fundament, eitt ella annað, sum bygt verður á, tað ber ikki til at liva í tilfeldiheitum. Tað mugu gerast viðtøkur osf.

Eitt partafelag skal gerast. Tað má hava ein stjórn, eginpeningur má vera. Skil má vera á tingunum, tað er vituligt.

Men tá tað kemur til andalig viðurskifti, halda summi, at her kann man ikki siga nakað víst. Her kann man einki vita við vissu, halda tey. Tá ið so summi trúgva tí, sum bíblian lærir so klárt um ævigt lív, synd, rættvísi, dóm osf. og byggja sína tilveru á hetta, verða tey skýrd sum fundamentalistar og fundamentalistar í negativari merking.

Men er tað neyðugt her í lívinum at hava fundament at byggja á, so mikið meira hava vit fyri neyðini, at hava eitt fundament at byggja á, tá í tað kemur til tey ævigu tingini. Jesus gav okkum sjálvur hetta fundamentið at byggja á. Hann sigur soleiðis í Matt. 7,24-27:

Hvør tann, sum tí hoyrir hesi orð Míni og ger eftir teimum, verður líkur vitigum manni, ið bygdi hús sítt á hellu. Grovregnið kom, áirnar vuksu, og vindarnir blástu og raktu hetta hús; men tað fall ikki, tí tað var grundað á hellu. Men hvør tann, ið hoyrir hesi orð Míni og ger ikki eftir teimum, verður líkur dára, ið bygdi hús sítt á sandi. Grovregnið kom, áirnar vuksu, og vindarnir blástu og raktu hetta hús; og tað fall, og fall tess var stórt."

Vit mugu ansa okkum, at vit ikki blanda ting saman. At ræðast alt, sum hevur við fundamentalismu at gera, fyri tí sumt er vert at ræðast, tað er at blanda tingini saman. Fundamentalisma, sum summi vilja kroysta niður yvir onnur við makt, ja enntá við hóttan eftir lívinum, má ikki skerast yvir ein kamb við tað fundament, sum Jesus býður okkum við orði sínum. Tað er ein útrættur armur til okkum, sum eru so illa stødd og ikki høvdu havt nakað at bygt á, hevði ikki Gud havt opinberað okkum tað við orði sínum.

Jú, okkum tørvar eitt fundament at byggja á. Okkum tørvar eitt ávíst stað at ganga ímóti, okkum tørvar sannleikan, her sum lygnin ræður, okkum tørvar lív her, sum deyðin ræður. Jesus sigur:

Eg eri vegurin, sannleikin og lívið. Byggir tú á hann? … tit, sum uppbygd eru á grundvølli ápostlanna og profetanna - og hornsteinurin er Kristus Jesus sjálvur. Ef.2,20.

Bíblian er svarið.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.